# Niels Jakob vann bláu troyggjuna



*Tríggir teir fremstu í Statoil kring Føroyar 2004: frá vinstru, nummar tvey Gunnar Dahl Olsen, vinnarin Niels Jakob Thomsen og nummar trý Niels Bay Petersen*


*Tríggir teir fremstu hjá teimum ungu við vinnaranum Anton Ørn Elfarsson í miðjuni. Anton gjørdi ikki mætari enn at vinna allar teinarnar í kappingini.*

**Hálvi hvalbingurin, Niels Jakob Thomsen, vann sunnudagin stóru súklukappingina Statoil kring Føroyar við níggju sekundum aftur til Gunnar Dahl Olsen**

SÚKLING

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sunnudagin endaði stóra árliga súklukappingin, Statoil kring Føroyar, eftir at súklað hevði verið í fimm dagar. Tilsamans hava súklararnir lagt okkurt um 330 kilometrar aftur um seg, og tá ið komið var á mál við Statoil-støðina í Gundadali sunnudagin, var tað Niels Jakob Thomsen, sum streyk avstað við samlaða sigrinum.

### Tvídystur millum Niels Jakob og Gunnar

Allar hesar dagarnar, ið súklað hevur verið, hevur tað víst seg, at talan fyrst og fremst hevur verið um ein tvídyst millum teir báðar Niels Jakob Thomsen og Gunnar Dahl Olsen um, hvør ið skuldi fara avstað við sigrinum.

Teir báðir hava allar dagarnar verið millum tríggjar teir fremstu á mál við undantaki av sunnudegnum, har teir saman við Niels Bay Petersen kappaðust um triðjaplássi aftan fyri Boga Kristiansen og Gunnlaug Jónasson.

Fyrsta dagin í kappingini var ein einkultstartur súklaður í Klaksvík, og her vann íslendingurin Gunnlaugur Jónasson við teimum báðum Gunnar og Niels Jakob beint aftan fyri seg. Næsta dagin var súklað í Eysturoynni, og tá eydn-aðist tað Gunnari Dahl Olsen fyri fyrstu og einastu ferð í kappingini í ár at vinna ein tein, tá ið hann kom á mál saman við Niels Bay Petersen, men føroyingurin hevði tó munin. Hendan dagin gjørdist Niels Jakob triðjur í kappingini.


*Frá kappingini sunnudagin. Súklað verður beint sunnan fyri brúnna við Streymin við Gunnari Dahl Olsen á odda*

### Einki varð avgjørt fyrr enn í síðstu løtu

Undan einkultstartinum á Sandoynni fríggjadagin hevði Gunnar Dahl Olsen lagt seg á odda í samlaðu kappingini við einari leiðslu upp á tíggju sekund niður til Niels Jakob Thomsen, men á 21 kilometra langa teininum á Sandi vann hálvi hvalbingurin sær fyrstaplássið aftur. Niels Jakob Thomsen vann einkultstartin, og hann var 16 sekund framman fyri Gunnar Dahl Olsen, sum gjørdist nummar tvey. Sostatt fekk Niels Jakob nú aftur leiðslutroyggjuna, men munurin niður til Gunnar var ikki stórur, einans seks sekund.

Spenningurin var tí stórur undan næstseinasta teininum, sum bleiv súklaður í Suðuroynni leygardagin. Teinurin var 77 kilometrar til longdar, og tí var møguleiki fyri, at onkur av súklarunum kundi gera ein vørr og kanska fáa eina avgerandi leiðslu, men so var ikki. Hóast Gunnar Dahl Olsen gjørdi eina roynd og leingi lá einsamallur á odda, bleiv hann innheintaður av Niels Jakob Thomsen fáar kilometrar, áðrenn komið var á mál, og Gunnar noyddist enntá at síggja hálva hvalbingin vinna teinin við trimum sekundum, soleiðis at Niels Jakob styrkti støðu sína í samlaðu kappingini.

Níggju sekund eru tó einki at tosa um í súklukappingum, og tí var einki avgjørt undan seinasta teininum, har súklað varð úr Tjørnuvík til Gomlu Rætt og aftur til Havnar, har ein finaluteinur bleiv súklaður.

### Bogi vann endabrestin

Eitt sindur óvæntað var tað kanska, at føroyski veteranurin, Bogi Kristiansen, streyk avstað við sigrinum á seinasta teininum. Teir báðir Niels Jakob Thomsen og Gunnar Dahl Olsen vóru kanska dekan ov taktiskir og hugsaðu mest um, hvar teir lógu í mun til hvønnannan, og tað gav øðrum súklarum møguleikan til at fara avstað. Bogi Kristiansen og íslendingurin Gunnlaugur Jónasson gjørdu sær dælt av hesum møguleika, og kappingin um sigurin á seinasta teininum stóð tí millum teir báðar. Munurin var sera lítil, men tá ið teir nærkaðust málstrikuni við Statoil-støðina í Gundadali, var Bogi eitt lítið vet framman fyri íslendingin, og tískil kundi skála-maðurin ogna sær enn ein sigur í stóru føroysku súklukappingini, sum hann áður hevur vunnið.

Bíðað var við spenningi eftir, at tríggir teir fremstu súklararnir í samlaðu kappingini, Niels Jakob Thomsen, Gunnar Dahl Olsen og Niels Bay Petersen, fóru at koma á mál, og um tað fór at eydnast Gunnari at stríða seg tey neyðugu níggju sekundini fram um Niels Jakob, soleiðis at hann kundi fáa samlaða sigurin. Skjótt gjørdist tað tó greitt, at teir tríggir lógu púra javnir, og lítið bendi á, at nakar kundi sleppa avstað frá hinum. Gunnar gjørdi onkra roynd, men ikki bar til, og tískil komu teir tríggir púra javnir um málstrikuna. Hetta merkti samstundis, at Niels Jakob Thomsen vann samanlagt, og tískil kann rópa seg vinnara av Statoil kring Føroyar 2004.

Hjá teimum ungu vann islendingurin Anton Ørn Elfarsson, og hann gjørdi ikki mætari enn at vinna allar tríggjar teinarnar. Fjallatroyggjuna vann Niels Bay Petersen.

## Endaliga úrslitið av Statoil kring Føroyar 2004:

**Vaksin:**

| | |
|---|---|
| 1. Niels Jakob Thomsen, Cycling Gladsaxe | 09.36.43 |
| 2. Gunnar Dahl Olsen, Tórshavnar Súkklufelag | 09.36.52 |
| 3. Niels Bay Petersen, Cycling Gladsaxe | 09.42.23 |
| 4. Gunnlaugur Jónasson, Hjólreiðufelag Reykjavíkar | 10.22.24 |
| 5. Bogi Kristiansen, Cycling Gladsaxe | 10.23.54 |
| 6. Gisli Karel Elisson, Hjólreiðufelag Reykjavíkar | 10.38.34 |
| 7. Eli Christiansen, Tórshavnar Súkklufelag | 10.59.09 |
| 8. Klaus Kildemand, IFO | 10.59.11 |
| 9. Beinir Rasmussen, Tórshavnar Súkklufelag | 11.54.51 |

**Ung:**

| | |
|---|---|
| 1. Anton Ørn Elfarsson, Hjólreiðufelag Reykjavíkar | 07.12.24 |
| 2. Kári Brynjólfsson, Hjólreiðufelag Reykjavíkar | 07.14.58 |
| 3. Hlynur Thorsteinsson, Hjólreiðufelag Reykjavíkar | 07.18.38 |
| 4. Bergur Ingemarsson, Tórshavnar Súkklufelag | 07.30.16 |
| 5. Torkil Veyhe, Tórshavnar Súkklufelag | 07.32.23 |
| 6. Dánjal Michaelsen, Tórshavnar Súkklufelag | 08.27.47 |



# Fleiri vilja hava Atla

**Síðstu dagarnar hava bæði Brann í Bergen og Sogndal sýnað KÍ liðformannin Atla Danielsen, sum hósdagin kemur aftur til Klaksvíkar**

KÍ LIÐFORMAÐURIN

*Jóannes Hansen*



*Stórur áhugi tykist verða fyri unga liðskiparanum hjá KÍ, Atla Danielsen, og bæði Brann og Sogndal úr norsku tippiliguni hava víst føroyska landsliðsleikaranum áhuga.*

Seinnu árini hevur tað ofta víst seg, at tá ið ein fótbóltsspælari í Klaksvík hevur stungið nøsina eitt sindur fram um hinar, so hevur tað verið skjótt, at hann ikki longur hevur verið í Klaksvík, men heldur hevur verið í onkrum øðrum føroyskum felag ella kanska í útlandinum.

Eingin ivi hevur verið um, at mest eyðsýndi spælarin hjá KÍ higartil í ár hevur verið Atli Danielsen, sum umframt at gerast alt meiri intergreraður partur av landsliðnum, eisini hevur fingið álitið at vera liðformaður í Klaksvík.

At tað hevur gingið væl hjá Atla tykist nú hava vakt áhugan hjá útlendskum feløgum. Í hvussu so er tvey norsk feløg tykjast hava áhuga í at vita, um KÍ liðformaðurin er ein spælari, sum tey kunnu brúka.

Annað felagið er Brann í Bergen. Í síðstu viku ljóðaði, at Atli skuldi til Bergen at royndarvenja í fimm dagar. Atli fór úr Klaksvík, men tá ið tað kom til stykkis, var tað ikki í Bergen, men heldur í Sogndal, at hann hevur royndarvant. Sogndal er felagið, har tríggir føroyskir spælarar vóru fyri trimum árum síðani - Hans Fróði Hansen, Julian Johnsson og Kurt Mørkøre.

Atli vandi upp undir vikuskiftið við Sogndal. Sunnudagin var venjingardystur millum Sogndal og Brann. Harvið fingu bæði feløgini møguleika at leggja klaksvíkingin á vágskálina. Úrslitið avvenjingardystinum var 2-2.

Atli Danielsen var á Sogndal miðvøllinum í 1. hálvleiki. Eftir steðgin var hann vongverji í høgru, og tá ið seinna umfarið var hálvrunnið, varð hann skiftur út.

Í gjár og í dag skuldi Atli venja við Sogndal. Ætlanin var, at hann skuldi koma aftur til Klaksvíkar í morgin, men nú verður tað ikki fyrrenn hósdagin. Um sáttmáli fer at spyrjast burturúr ella ikki, og um Atli yvirhøvur er áhugaður í at fara til Noregs at spæla fótbólt hevur einki verið at hoyrt um enn.

Í fyrsta umfari hevur KÍ liðformaðurin tikið hetta sum ein áhugaverdan møguleika at tevja, hvussu lívið gongur fyri seg hjá yrkisspælarum.

Síðani tað í síðstu viku frættist, at møguleiki var fyri, at KÍ skuldi missa liðformannin til norskan fótbólt, hevur lívligt orðaskifti verið á KÍ heimasíðuni, har summi siga seg vera fegin um, at evnaríki spælarin tykjast hava møguleika at royna, hvussu langt evnini kunnu røkka uttanfyri landoddarnar, meðan onnur geva ilt av sær um, at tað eina ferð skal vera KÍ, sum verður knokkroytt fyri bestu spælararnar!

## Gunnar stóð allan dystin

Føroyski málmaðurin Gunnar Nielsen stóð í málinum, tá ið felag hansara Frem undan vikuskiftinum spældi venjingardyst ímóti HIK. Sambært heimasíðuni hjá Frem høvdu fleiri ungir spælarar fingið møguleikan á liðnum, og Gunnar Nielsen var ein teirra. Føroyski málmaðurin helt málið reint, og Frem vann dystin 2-0.

Jón Rói Jacobsen, sum eisini spælir í felagnum, var ikki við í dystinum. Frem, sum fyrireikar seg til nýggju kappingina í næstbestu donsku deildini, skuldi mánakvøldið spæla venjingardyst ímóti Herfølge.

## Amager vann

Fremad Amager vann sunnudagin ein venjingardyst ímóti Næstved 3-0. Andrew av Fløtum byrjaði inni, men var tikin út í seinna hálvleiki, tá ið Jann Ingi Petersen kom á vøllin. Hjalgrím Elttør varð settur inn í hálvleikinum. Eingin av teimum føroysku spælarunum skoraði

## Esbjerg gott úrslit

Danska felagið Esbjerg spældi sunnudagin javnleik í fyrra Intertoto Cup dystinum ímóti litaviska liðnum FK Vetra. Dysturin var á útivølli og endaði 1-1. Málið hjá Esbjerg skoraði Jess Thorup.

Seinni dysturin millum feløgini verður í Danmark næsta vikuskiftið, og kemur Esbjerg víðari frá hesum umfarinum kunnu teir vænta sær at spæla ímóti týska felagnum Schalke. Esbjerg hevur longu vunnið á NSÍ og Nice í Intertoto Cup.

# Lukasz á landsliðið

**Fyrrverandi unglingaspælarin í Vági, sum nú er í Brøndby, hevur nú fingið boð um at spæla á pólverska unglingalandsliðnum**

ÚTISETI

*Jóannes Hansen*

Kanska er tað eitt sindur misvísanda at kalla hann fyri útiseta, tá ið hann nú hevur fingið boð um umboða annað land enn Føroyar. Men tað er ein veruleiki, at Lukasz Cieslewicz hevur búð í Føroyum í fleiri ár. Hann er sonur Robert Cieslewicz, sum fyri nú fleiri árum síðani kom úr Póllandi og til Føroya at spæla fótbólt. Fyrstu árini var hann í Fuglafirði, og síðani hevur hann verið bæði í Vági og í Sumba, har hann eisini royndi seg sum venjari.

At Lukasz hevur havt serliga góð evni sum fótbóltsspælari, hevur eingin, ið hevur sæð hann spæla, ivast í. Hann var so nógv tann besti á dreingjaliðnum og á unglingaliðnum hjá VB, sum hesi seinastu árini hava staðið seg so avbera væl.

Tíðindini um serligu evnini hjá unga manninum hava rokkið tvørtur um Atlantshavið. Í vár flutti Lukasz til Brøndby, har hann hevur staðið seg væl í álopinum á unglingaliðnum, og nú hevur pólverska fótbóltssambandið sent boð eftir honum.

Lukasz er úttikin at venja við pólverska U-18 landsliðnum, og so verður spennandi at síggja, hvussu langt fótbóltsevnini fara at røkka. Bæði í landsliðshøpi og í felagshøpi. Brøndby hevur sjálvandi skrivað sáttmála við Lukasz Cieslewicz, tí teir rokna hann vera góðan møguleika í Brøndby álopinum í framtíðini, og sjálvandi hava teir eisini hugsað um møguleikan, at teir kunnu fáa pengar fyri at selja hann til okkurt annað og størri og ríkari felag í Europa.

At hann er í Brøndby, og at hann nú hevur fingið landsliðsboð ber við sær, at dreymurin hjá Lukasz Cieslewicz at liva av at spæla fótbólt og at vinna meiri enn til lívsins uppihald við at brúka fótbóltsevnini er tættari við at gerast veruleiki nú, enn dreymurin frammanundan hevur verið.